VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Ein katastrofal blanding

Katastrofala blandingin av at økja almennu rakstrarútreiðslurnar samstundis, sum ein millión um dagin varð kubbað av almennu inntøkunum, hevur nú fingið væntaðu avleiðingarnar.

Síðani Finn Norman Christensen bygnaðurin kom, eru almennu lønarútreiðslurnar næstan tvífaldaðar, uttan at borgarin hevur merkt tilsvarandi betran av tænastunum.

Kontrollstovnar hava verið uppraðfestir, meðan annað hevur verið niðurraðfest ella hevur staðið í stað.

Ein stovnur sum Landsverk er ein viðfáningur í mun til fyrr, meðan TAKS hevur á leið tvífalt so nógv starvsfólk per íbúgva, enn skattavaldið í metskattaða Danmark. Heilsufrøðiliga Starvsstovan og eitt nýstovnað Uttanríkisráð hava í part á leið eina promillu av føroyska fólkinum í starvi.

Sjálvandi eru slíkir stovnar neyðugir og gera fólk í hesum stovnum sítt arbeiði eftir førimuni innan settar karmar. Men karmarnir mugu broytast.

Tað er neyðugt at lóggeva eftir føroyskum viðurskiftum og umsitingarorku. ES direktiv eiga bara at vera sett í verk, tá tað er ynskiligt, ella tá vit noyðast av útflutningsávum. Vit koma ongantíð at hava nóg nógv fólk at umsita ES reglar eftir donskum leisti, og tí kunnu vit akkurát tað sama gevast við tí beinanvegin.

Umráðandi er, at politikarar biðja onkran uttan fyri umsitingina leggja lag á við bygnaðarbroytingum og rationaliseringum, tí ikki kann væntast, at umsitingin verður serliga íðin í einum arbeiði, sum handlar um at minka seg sjálvan mest møguligt.

Okkum tørvar ikki populistiskar útmeldingar um "tunnils time-out" frá okkara fíggjarmálaráðharra. Avbjóðingin hjá honum og hansara politisku kollegum er ikki ein almenn íløga her ella har, men heldur at almennu Føroyar hava sett rakstrarútreiðslurnar eftir metinntøkum, samstundis sum blokkurin var skorin eftir somu metinntøkum.

Tá blokkurin var skorin við 366 milliónum um árið, so áttu almennu útreiðslurnar at verið skornar við somu upphædd, sum man skar burtur. Hetta varð ikki gjørt, tí at man billaði fólki inn, at niðurskurðurin ikki fór at merkjast. Hann merktist heldur ikki stórvegis, meðan heimurin reið á einari søguligari forbrúks- og lánsbylgju við tilhoyrandi metinntøkum í MVG og skatti. Men nú tá gerandisdagur er aftur, so manglar í. Ein fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum segði á sinni, at skuldu vit minka um blokkin, so mátti tað vera eitt krav, at inntøkurnar hækkaðu samsvarandi. Tað vita vit, at tað hava tær ikki gjørt, og tí er útreiðsluminking svarið, men heldur ikki her hevur borið til. Og hvussu ber tað til, at summi virki og feløg sleppa undan at rinda MVG, tá onnur verða tvingað at halda lógina.

Almennu Føroyar standa við eitt vegamót. Antin taka politikarar sær um reiggj og fáa ein almennan bygnað og ein rakstur, sum hóskar til føroysk viðurskifti, so vit framhaldandi hava ráð til vælferð, ella mugu teir niður til Danmarkar við hattinum í hondini at biðja um øktan studning til at fíggja raksturin av almennu Føroyum.

Sosialurin

Seyður og bústaðarmynstur

JÓGVAN OLSEN
Debesartrøð, Havn

Viðmerking í sambandi við uppskot um hegning fram við vegunum.

Hvat hava seyður og bústaðarmynstur við hvørt annað at skaffa? Kanska ikki so lítið. Bústaðarmynstrið hevur týdning í samband við nógv viðurskifti í samfelagnum, kanska tey flestu. Altíð verður snakkað um samferðslumøguleikar og infrakervi (sum ongantíð er nóg gott).

Bústaðarmynstrið hevur týdning í sambandi við øll viðurskifti, har samferðslumøguleikarnir hava týdning. Í roynd og veru størri, tí tað er bústaðarmynstrið, sum ger, at tørvurin á alsamt breiðari og beinari vegum ongantíð nøktast.

Hvussu er okkara bústaðarmynstur, tá ikki verður hugsað um húsasnið? Fólk sleppa at búseta seg á hvørjum tanga og á hvørji trøð. Kravinum um at kunna koyra heim í túnið verður ongantíð talað ímóti. Samstundis sleppa fólk at reka ein landbúnað, sum avmarkar hvørji onnur endamál, landslagið kann brúkast til, hóast hann lítlan og ongan búskaparligan týdning hevur. Onnur endamál kunnu vera vilt plantu- og djóralív, frítíðarlív (sum verður avmarkað av til dømis stikum) og endiliga ferðslan millum tær nógv spjøddu búsetingarnar.

Sjálvt um alt annað má víkja fyri bilkoyringini, hevur seyðurin tó havt rættin fram um bilarnar. Nú verður so aftur snakkað um at tryggja ferðsluna – les: bilkoyringina – út á tey spjøddu búplássini. Hesuferð er tað móti seyði, bilkoyrararnir skulu tryggjast. Til aðrar tíðir er tað móti omanlopi. Og altíð skulu teir tryggjast móti ov lítlari ferð.

Útreiðslurnar av hesum ferðslumynstrinum fara ongantíð at gevast at vaksa. Hetta eru resursur, vit kundu brúkt til útbúgving, mentan og menning av nýggjum vinnugreinum, soleiðis at landið kundi verið nakað meira áhugavert at búsett seg í. Hetta ferðslumynstrið kemur av bústaðarmynstrinum, upprunaliga, men nú styrkja tey hvønn annan.

Fyri at allokera resursur skilagott, er neyðugt at raðfesta. Í mun til seyð á vegnum og aðrar samferðsluspurningar, eiga vit at raðfesta, hvar fólk skulu búgva. Ikki soleiðis at skilja, at vit eiga at flyta fólk burtur frá verandi bústøðum. Hinvegin, um vit øll skulu gjalda tað, sum samferðslan kostar, so mugu vit øll vera við til at avgera, hvat bústaðarmynstrið skal vera. Nøkur góð parametur fyri bústaðarmynstrinum munnu vera 1) talið av bústaðarøkjum, 2) íbúgvatættleikin og 3) støddin av bústaðarøkjum. Tess færri bústaðarøkir, størri íbúgvatættleika og størri bústaðarøkir, tess smærri verða útreiðslurnar av samferðsluni. Útreiðslurnar av samferðslu eru nógvar ymiskar. Tann mest gloymda er forbrúkið av natúrligum landslagi. Beinleiðis verður landslagið brúkt til vegir við tilhoyrandi vegskráum. Óbeinleiðis gevur okkara ferðslumynstur eitt uppaftur meira spjatt byggjarí, til bústaðir og vinnu. Hetta spjadda byggjaríið brúkar óneyðuga nógv lendi í sær sjálvum og førir harafturat til meira vegagerð, tí frástøðurnar gerast størri. Aðrar útreiðslur eru orkunýtsla, ferðsluvanlukkur, viðlíkahald, vegagerð og fleiri sløg av dálking.

Ein møguleiki at minka um hesi árin er at gera eina ætlan fyri, hvussu bústaðarmynstrið skal vera. Hvussu nógv bústaðarøkir, vit skulu hava – í mesta lagi. Hvussu nógv skulu búgva á hvørjum ferkilometri – í minsta lagi. Og hvussu nógv skulu búgva í hvørjum býi – í minsta lagi.

Ein annar møguleiki, sum eigur at verða brúktur saman við áðurnevnda, er tað at lata fólk gjalda fyri vegirnar.

Fleiri mátar eru at gera hetta:

Ein er at lata kommununar gjalda fyri vegirnar. Landsverk kann tá vera ein tænastuveitari fyri kommununar.

Ein annar er at seta 20 ella fleiri gjaldsstøðir upp, eins og tær báðar, sum longu eru við undirsjóvartunlarnar. Tá tú koyrir gjøgnum eina gjaldsstøð, betalir tú so alt eftir, hvussu nógv vegakervið, tú nú koyrir inn á, kostar í rakstri og anlegg í mun til, hvussu nógv, tað verður brúkt.

Ein triði møguleiki er at menna eina tøkniliga gjaldsskipan, sum passar til føroysk viðurskifti. Harvið høvdu vit eisini fingið eina tøkniliga útflutningsvøru.

Brúkaragjald eigur undir øllum umstøðum at vera á vegunum. Millum annað til at dekka hegning fram við. Brúkaragjald er tó ikki nóg mikið, tí vit kunnu óansæð ikki loyva okkum at binda framtíðina til okkara ferðslumynstur. Hetta kann einans uppnáast við eini ætlan fyri bústaðarmynstrinum.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støddir:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.